# TILTØK

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld verður onki ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Ólavi Jacobsen, kl. 18 Evangel. møti v/ Alex O'Campo.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Leygardagin After Eight, høllin er opin frá kl. 13-15.
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Tórálvi á Steig.
Sunnudagsskúlin er í summarfrí, lýst verður, tá byrjað verður aftur.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Meinigheitshúsið**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Petur Steingrund, kór luttekur, eisini verður solosangur.

**Ebenezer**
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti.

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Pater Quang Minh Nguyen í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Samkoman Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti við Ólavi og Ásu Jøkladal og á tilbiðjunarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Zachariasen um: Týdningurin á missión.
Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 19.30 úti á Fløtum. Bøn og Bíbliutími.

**Kirkjan, Hósvík**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ John S. Myllhamar, trúboðara. Sangbókin verður brúkt.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 19 Møti við Anniku Høj. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Elim í Søldarfirði**
Sunnudagin kl. 12 Breyðbróting og sunnudagsskúli. Á møtinum kl. 18 sangluttøka úr Nebo av Toftum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafirði**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21. Sunnudagin kl. 18 Møti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 17.30 Bønar- og lovsongsløta. Kl. 18 Møti. Innsavnan. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K í Norðoyggjum**
Fríggjadag kl. 22 Opið hús. Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Hanus Lassen, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Pizzakvøld. Sunnukvøldið kl. 18 Møti við luttøku úr Vík og Tjørnuvík. Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20, allar kvinnur eru vælkomnar.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 18 Møti við Eivinn Bringsberg (barnaansing er undir møtinum). Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin. Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Kammu og Albert, Mourits syngur. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 18 Evangel. fundur. Ónsdagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.

**Zion, Vágur**
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánadag Bønarmøti kl. 21. Frá kl. 21-23 verður bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja, um tær tørvar forbøn.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 23. juni*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Kortspæl, telving, landastrok, telving, dart og onnur spøl.
**Ólavsøkulistin er komin.**
*Týsdagin 24. juni:*
kl. 10-12 Vit baka til ólavsøku
kl. 10-11.30 Felagssangur við starvsfólkum á býráðunum. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Prát
*Mikudagin 25. juni:*
kl. 10-17 Opið hús
kl. 15 Túrur
*Hósdagin 26. juni:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen. Hugnaløta.
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 27. juni:*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 26. juni verður gingið niðan á Lokkafelli og Nøvina. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30 Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

**Eysturoyar Gongufelag**
Um viðrar, verður gongutúrurin niðan á Malinsfjall á Viðoynni aftur á skránni sunnudagin 29. juni. Vit sigla av ferjuleguni í Leirvík kl. 11. Frá Klaksvík koyrir bussur til Viðareiðis. Frásøgumaður er Jóan-Jacob Heinesen. Túrurin er miðal. Tilmelding á Kunningarstovunum í Eysturoy á tlf. 449449, 444860 ella 211449.

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Vit fara í summarfrí frá 1. juli til 1. september.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvønn hósdag kl. 17.30 til 18.30 og sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Samband við felagið fæst við at ringja tlf. 22 95 83.
Umsóknarbløð til Heimavirkisleguna í Danmark í summar kunnu fáast við at venda sær til felagið.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 28. juni giftast í Prestagarðinum á Ziskatrøð Annika Vilhelm, Kunoy og Tummas Andreassen, Viðareiði. Opið hús veðrur í heima teirra í Kunoy frá kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.


Krosstein www.krosstein.fo
Pf. Svend
Hafa® Baðirúmsmøblar
vakurleiki, snið, góðska

VHS Alt tilfar til VATN - HITAVERK - SANITET - VENTILATIÓN
Falkavegur 6 · FO-110 Tórshavn
Tel. 34 46 00 · Fax. 34 46 01
E-mail: krosstein@krosstein.fo
Sosialurin 311820




## FILMSTEIGURIN

# Charlie´s Angels uden hæmninger

Teir tríggir einglarnir, Natalie (Cameron Diaz), Dylan (Drew Barrymore) og Alex (Lucy Liu) verða settar á eina torføra uppgávu. Stjórnin vil gjarna geva samstarvsáhugaðum vitnum í álvarsamum rættarmálum verju – ein aktuellur trupulleiki í fleiri støðum í heiminum. Tey kunnu fáa tilboð um nýggjan samleika og fáa eitt nýtt lív í einum nýggjum umhvørvi, langt frá øllum teimum kriminellu. Tað avgerandi er, at tey verða vard, sum vitni.





Tá tey virðismiklu vitnini brádliga doyggja undir løgnum umstøðum, tá virðismiklar upplýsingar um, hvønn alt er um, tykjast at vera komnar í skeivar hendur, mugu Charlie´s Angels brádliga í aktion. Tær hava mannfólkahjálp, sjálvt um hon ikki er neyðug) av Jim Bosley (Bernie Mac). Teirra royndir í duldarbúnum, undercoverarbeiði og kampbardøgum úr eystri merkir, at tær saktans kunnu arbeiða einsamallar.

Áhugin, mistankin, savnar seg um Madison Lee (Demi Moore) ein fyrrverandi eingil, sum hevur svikið nøkur av sínum gomlu idealum. Alt byrjar í Mongoliet og endar við at Dylan setir lívið hjá hennara bestu vinkonunum uppá spæl…




Fríggjadagin 27.06. kl. 19$^{00}$
Fríggjadagin 27.06. kl. 23$^{30}$
Leygardagin 28.06. kl. 21$^{15}$
Sunnudagin 29.06. kl. 20$^{00}$
Fríggjadagin 27.06. kl. 21$^{15}$
Leygardagin 28.06. kl. 19$^{00}$
Leygardagin 28.06. kl. 23$^{30}$
Sunnudagin 29.06. kl. 22$^{30}$

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Fríggjadagin 27.06. kl. 18$^{30}$
Leygardagin 28.06. kl. 18$^{30}$
Sunnudagin 29.06. kl. 18$^{30}$
Fríggjadagin 27.06. kl. 20$^{45}$
Leygardagin 28.06. kl. 20$^{45}$
Sunnudagin 29.06. kl. 20$^{45}$



Fríggjadagin 27.06. kl. 23$^{00}$
Sunnudagin 29.06. kl. 23$^{00}$
Leygardagin 28.06. kl. 23$^{00}$

KOMANDI FILMUR



Frumsýning Fríggjadagin 04.07.

BIO KIOSKIN
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.